**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 37 11 33 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Skrivstovufólk

**Eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk er leyst til setan 1. august 2007.**

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitum umfatar starvið uppgávur á lønarskrivstovuni, men eisini annað fyrifallandi skrivstovuarbeiðið.

**Førleikakrøv**
Tað er fyrimunur, at tann, ið settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving, eisini skal viðkomandi kunna arbeiða til teldu.

Harumframt skal viðkomandi verða fyrikomandi, arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir**
Løn og setanarviðurskifti, ið eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Bent Albinus tlf. 37 11 33 lokal 141.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

Umsjónarmannin
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

í seinasta lagi 18. juli 2007.

## Felagsskúlin á Oyrarbakka

lærarastørv

**Søkt verður eftir lærarum**

· 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 vegna avlopstímar. Starvið er umleið 10 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett eftir 1. september.
· 1 styttri tíðaravmarkað starv fyri lærara, ið er í farloyvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

· undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
· duga at samstarva og eru fyrikomandi
· eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
· vilja taka við teimum broytingum, ið flyta skúlan til at taka ímóti teimum avbjóðingum samfelagið setir næminginum

**Hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**

· undirvísa í donskum og enskum
· undirvísa í alis- og evnafrøði, landalæru og lívfrøði
· undirvísa í rokning og støddfrøði
· undirvísa í tilevning
· undirvísa gentum í ítrótti og svimjing

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum og hava hollan kunnleika til teldur sum amboð/miðil í frálæruni.
Tó kunnu lærarалesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er Felagsskúlin á Oyrarbakka. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.
Tað tíðaravmarkaða starvið verður sett fyri skúlaárið 2007/08 og tað styttra tíðaravmarkaða frá 1. august til 31. desember 2007.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. juli 2007.

**Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til skúlastjóran tlf. 212084.**

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 37 11 33 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Bókhaldari

**Eitt starv sum bókhaldari er leyst til setan 1. august 2007.**

**Starvslýsing**
Starvið umfatar ábyrgd av høvuðsbókhaldinum hjá stovninum. Herundir debitor, kreditor og finans.

**Førleikakrøv**
Tað er fyrimunur, at tann, ið settur verður, hevur kunning til FSL-skipanina.

Harumframt skal viðkomandi verða fyrikomandi, arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir**
Løn og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Jónvør Bjarkhamar tlf. 37 11 33 lokal 136.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

Umsjónarmannin
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

í seinasta lagi 18. juli 2007.

Skikkaður umsøkjari er til starvið.

**Fiskimálaráðið**
FØROYA SKIPASKRÁSETING

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður stongt frá fríggjadegi 20. juli 2007.

Opið verður aftur týsdagin 31. juli 2007.

Skjøl til skipaskrásetingina kunnu í hesum tíðarskeiði latast inn í móttøkuni hjá Fiskimálaráðnum, Heykavegur 6, 100 Tórshavn.

# Teknikkari

**Søkt verður eftir teknikara at byrja skjótast gjørligt.**

**Førleikakrøv:**

Fyrimunur er um umsøkjarin er útbúgvin radiomekanikari, radioteknikkari ella hevur líknandi royndir.
Hevur kunnleika til teldur og net.
Kann arbeiða sjálvstøðugt.
Koyrikort er ein treyt.

**Arbeiðið umfatar:**

Uppsetan og tænastuveitan av:
Navigatións-, fiskileiti- og samskiftisútgerð og fylgisveinatænastur til skip.

**Víkmar**
Vestara Bryggja · Postsmoga 3033
110 Tórshavn · Tel. 352182 · info@vikmar.fo
www.vikmar.fo

# Ársaðalfundur

**Ársaðalfundur hjá Ognarhaganum í Kvívík verður í Glæmuni mikudagin 18. juli 2007, klokkan 19.00, við hesi dagsskrá:**

1. Ársroknskapurin fyri 2006
2. Nýtt Ognarhús »Yviri í Gerði«
3. Útstykking »Frammi í Gerði« og »Frammi í Forna«
4. Ymiskt

**Nevndin fyri Ognarhagan í Kvívík**

Lesið Sosialin - so eru tit við